# Viðbrekin toskastovnur krevur serlig átøk

**FISKIVINNA** **Grønlendski toskafiskiskapurin er bert grundaður á ein einstakan árgang.**

Snorri Brend

Tað er ein stórur spurningur, hvussu nógvur toskur verður eftir í grønlendskum farvatni, tá toskurin frá 2005-árganginum er fiskaður upp.

Hesin spádómur hevur skapt stúran hjá fólki innan fiskivinnuna, tí eingin veit hvat fer at henda, tá hesin toskurin fer at hvørva.

- Støðan er nevniliga hon, at eingin nýggjur árgangur í somu støðd, er komin síðani, verður sagt.

Tekin eru ikki um, at nýggir árgangir av toski eru ávegis. Hetta førir aftur við sær, at toskafiskiskapurin á nærleiðunum er grundaður á eitt sera veikt grundarlag, tí talan í roynd og veru bert er um ein einstakan árgang.

- Ein framhaldandi fiskiskapur verður tí treytaður av at fleiri stórir árgangir koma, og sum kunnu avloysa teir eldru, sohvørt sum teir hvørva úr fiskiskapinum, sigur Ane Hansen, umboðandi fiskivinnuna í grønlendska landsstýrinum.

Í løtuni verða gjørdar kanningar innanskers í nánd av Sisimiut, Nuuk og Qaaqrtoq. Hesar skulu staðfesta, um ungfiskur finst her og sum kann verða grundarlagið undir framhaldandi fiskiskapi komandi árini.

**LEIKIR**



*Grønlendingar hava góðar vónir um heiðursmerki, hóast fimm ár eru til teir skulu skipa fyri arktisku leikunum í 2016*

## Fakta: AWG

Arctic Winter Games er eitt ítróttar- og mentunartiltak fyri ungdóm úr arktiska økinum.
Leikirnir verða hildnir annaðhvørtár, og verða hildnir 21. ferð í Grande Prairie í Canada komandi ár.
Í 1970 luttóku 500 ítróttarfólk, meðan omanfyri 2000 taka lut nú.
Í fjør luttóku ítróttarfólk úr 9 økjum, teirra millum Grønland og Samaland.

# Vænta fleiri heiðursmerki í 2016

**ÍTRÓTTUR** Nuuk skal skipa fyri Arctic Winter Games 2016. Vónin er, at fleiri heiðursmerki verða verandi í Grønlandi.

Snorri Brend

**Hóast fimm ár eru til leikirnar, eru fyrireikingarnar langt síðani farnar í gongd.**

**Millum tey ið fara at geva sítt íkast til leikirnar er felagsskapurin Grønlands Skoleidræt.**

**– Vit ynskja at fáa fleiri dugnaligar næmingar at gera meiri við ítróttin tey komandi árini, verður sagt úr felagsskapinum.**

**Vónin er, at grønlendingar við hesum átaki fara at fáa uppaftur fleiri heiðurstekin í 2016.**

### Dugnalig

**Arctic Winter Games verður største einstaka ítróttartiltakið nakrantíð í Grønlandi.**

**– Vit ynskja at fara undir eina verkætlan, sum skal miða eftir at fáa fatur á dugnaligum næmingum, sum vilja gera ein eyka innsats, sigur leiðarin í felagsskapinum, Kim Godtfredsen.**

**Ætlanin er at fáa uppaftur fleiri heiðursmerki til Grønland hesar dagarnar undir AWG 2016.**

**Arktisku leikirnir verða skipaðir annaðhvørt ár. Komandi ár verða teir í Canada og í 2014 í Alaska, og altso í Nuuk í 2016.**

**Undir teimum 21. leikunum í Canada í 2010, endaði Grønland á einum 6. plássi við 49 heiðurskerjum - 18 gull, 16 silvur og 15 bronsu.**

**Hetta var langt frá góða úrslitinum hjá Alaska, sum fekk ialt 251 heiðursmerki.**

# Grønland tiðnar

**NASA** hevur nú prógvað, at grønlendski ískappin tiðnar skjótari enn mett. Tiðningin var størst í 2010.

Snorri Brend

Innlandsísurin tiðnar skjótari enn allar forsøgnir hava sagt.

Alheims upphitingin við hækkandi hita, hevur ført til at sumrini byrja fyrri og ísurin tiðnar skjótt kring alt Grønland.

Hesar upplýsingar hevur NASA savnað saman frá veðurfylgisveinum.

Hesir fylgisveinar máta smáar nøgdir av mikrubylgjur, ið koma frá ísi og vatni.

Ein onnur avleiðing av hesum er, at grønledsku sumrini hava vart í 60 dagar longur, enn miðaltalið seinastu 30 árini.

### Steðgar

Tað eru tó ikki allir granskarar ið eru eins dapurtskygdir um innlandsísin.

Hesir vísa á, at tey heitu sumrini kortini ikki fáa ísin at ferðast skjótari ímóti havinum.

– Nei, sigur professarin, Andrews Shepherd frá University of Leeds. – Grønlendski innlandsísurin er tryggari enn vit áður hava hildið.

Hansara fólk komu fram til, at størri nøgdir av távatni skapa serstakar kanalir undir ísinum, sum síðani leiða vatnið burtur.

Hetta hevur aftur havt ta avleiðing at glíðingin verður bremsað á einum ávísum støði.



**ÍSUR**

*Ymiskar útsagnir um støðuna við grønlendska innlandsísinum. Flestu serfrøðingar eru tó samdir um, at hann tiðnar skjótari enn gott er*